

## Jón Rói farin at renna

Føroyski fótbóltsspælarin í AaB, Jón Rói Jacobsen, er í løtuni við drúgvu uppvenjingina eftir krossbandsskaða í knænum. Í gjár var ein serligur dagur hjá Jón Róa, tí tá hann rann aftur fyri fyrstu ferð, síðani hann fekk skaðan.

- Jón Rói royndi at renna heilt spakuliga, og tað gekk fínt, sigur Henrik Bøgvad, fysioterapetur, við heimasíðuna hjá AaB.

Tað eru átta vikur, síðani Jón Rói var skurðviðgjørdur, og hann ætlar sær at verða klárur at spæla aftur stutt eftir ársskiftið.

## Grikkaland inn í hitan aftur

FIFA hevur nú slept suspenderingini av Grikkalandi í altjóða fótbólti. Tað var tann 3. juli, at FIFA tók drastisku avgerðina og útihýsti Grikkalandi frá øllum altjóða kappingum, tí politiski myndugleikin blandaði seg upp í fótbóltsviðurskifti í Grikkalandi. Síðani hevur verið arbeitt dúgliga í Grikkalandi við at sleppa upp í aftur fótbóltsfamiljuna, og tað hevur eydnast. FIFA kennir seg nú sannført um, at politiska uppíblandingin er steðgað, og Grikkaland sleppur nú aftur at taka lut í altjóða fótbóltskappingum.

# Zidane angrar einki



*- Hann tosaði niðursetandi um systur mína og mammu mína. Eg helt mær fyrstu og aðru ferð, men tá hann triðu ferð endurtók hetta, misti eg tamarhaldið á mær sjálvum. Eg eri ein maður, og summi orð raka harðari enn onnur. Og satt at siga, so vildi eg heldur verið sparkaður niður, heldur enn at hoyra slíkt, segði Zidane um tilburðin í HM-finaluni*

**Zinedine Zidane hevur biðið fótbóltsheimin um umbering fyri reyða kortið. Men hann sigur samstundis, at italski Materazzi hevði provokerað hann til hetta**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið greiddi Zinedine Zidane fyrstu ferð frá hendingini, tá ið hann fekk reyða kortið í HM-finaluni sunnukvøldið. Hann brast saman við italskan verjuspælara og varð vístur út.

– Hann togaði fleiri ferðir í troyggjuna hjá mær, men eg segði honum bara, at vildi hann hava troyggjuna, so kundi hann fáa hana eftir dystin.

– Síðani tosaði hann niðursetandi um systur mína og mammu mína. Eg helt mær fyrstu og aðru ferð, men tá hann triðu ferð endurtók hetta, misti eg tamarhaldið á mær sjálvum. Eg eri ein maður, og summi orð raka harðari enn onnur. Og satt at siga, so vildi eg heldur verið sparkaður niður, heldur enn at hoyra slíkt.

– Eg vil biða um umbering, tí eg var avgjørt ikki nøkur góð fyrimynd í hasum førinum. Ikki minst, tí hópin av børnum kring allan heim hugdu at. Men eg angri einki. Gjørdi eg tað, so vildi eg samstundis viðgingið, at Materazzi hevði rætt til at siga tað, sum hann segði, og tað hevði hann ikki.

Soleiðis greiddi Zinedina Zidane frá hendingini, sum gjørdist keðiliga punktumið yrkisleiðini hjá einum av bestu spælarunum í fótbóltssøguni. Undan hendingini, sum bar reyða kortið við sær, høvdu Zidane og Materazzi als ikki verið í hornatøkum í dystinum.

### Matarazzi vísir øllum aftur

Mamman hjá Zidane er í løtuni á sjúkrahúsi í viðgerð fyri álvarsliga sjúku. Men Materazzi heldur fast um, at hann ikki segði nakað slíkt.

– Eg segði einki um um trúarlív, rasismu ella politik. Og eg segði avgjørt einki um systur ella mammu hansara. Eg mist sjálvur mammu mína, tá eg var 15 ára gamal. Eg visti einki um, at móðir hansara var á sjúkrahúsi, men eg ynski henni alt tað besta, sigur Marco Materazzi, sum veruliga var í miðdeplinum í finaluni.

Fyrst var hann maðurin, sum framdi brotssparkið, ið Italia skoraði uppá. Síðani javnaði hann til 1-1. Og eftir 110 minuttum var hann altso maðurin, sum merkti seinasta stútaran í glæsiligu yrkisleiðini hjá Zinedine Zidane.

# Góð úrslit í

**Trettan føroyskir rennarar vóru við í stórari rennikapping í Svøríki í farnu viku. Vónirnar um at vinna heiðursmerki í kappingini vóru ynskihugsan, men tveir av ungu rennarunum gjørdu bart og vunnu heiðursmerki**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Tíðindaskriv*

Seinnu árini hevur sersambandið fyri frælsan ítrótt FÍF sent ungdómslandsliðið við til altjóða kappingar uttanlands. Í ár, eins og í fjør, gekk leiðin til Välds Ungdomsspelen í Gøteborg. Henda kapping er tann størsta av sínum slagi í Norðurlondum, og ein tann størsta í Norðureuropa yvirhøvur.

Her savnast ungdómselita úr serliga norðurlondum, men eisini aðrar tjóðir nær og fjar velja hesa kapping sum størstu avbjóðing til teirra ungdómselitu. Hesuferð vóru 3.200 luttakarar úr 20 londum savnaðir saman, har ímillum landslið úr Danmark, Íslandi og Qatar.

Føroyar høvdu 13 ungdómar við, sum vóru savnaðir saman úr øllum landsins herðashornum: úr Trongisvági til Norðdepli og av Nesi, Toftir til Syðradals S, umboðandi øll fimm føroysku frælsu ítróttarfeløgini. Hetta hevur kravt nógva ferðing í sambandi við venjingar, sum í stóran mun eru farnar fram á breytini á Svangaskarði. Og dúgliga hevur verið vant, og vónirnar um bólkamet og møguliga okkurt føroyskt met eisini vóru góðar. Tó má viðgangast, at vónirnar um heiðursmerki mest vóru at meta sum ynskihugsan.

### Rúni og Rebekka vunnu heiðursmerki

Fyrstur at kappast var 12 ára gamli Rúni Seloy. Hann skuldi vera við í A-finaluni á 600 metra teininum, har hann fyrr hevur víst, at hann einki stendur aftanfyri teir bestu í grannatjóðunum. Hesuferð hevur hann tó verið darvaður av skaðum, so vónirnar um eina toppplasering vóru ikki tær bestu. Men tað legði Rúni einki í. Eftir 200 metrum tók hann leiðsluna, og førdi til góðir 100 metrar vóru eftir. Í einum spennandi spurti eydnaðist tað Rúna at vinna bronsumerkið, og seta nýtt bólkamet við tíðini 1.41,05. Eisini á 1500 metrum stóð Rúni seg væl, tá hann bleiv nr. 11 og setti nýtt bólkamet 4.54.92 Í hesi kapping rann hann móti 13 ára gomlum.

Eisini 13 ára gamla Rebekka Fuglø úr Norðdepli gjørdi bart fyrsta dagin. Rebekka var kanska hon vit høvdu bestu vónir um at røkka einum heilt góðum úrsliti, og hon skuffaði ikki. Í A-finaluni á 600 metrum rann hon seg inn á eitt flott 3. pláss, bert eina hondsbreidd frá nr. 2, og í nýggjum bólkameti 1.44,44 min. Leygardagin framdi Rebekka enn eitt bragd, tá hon í A-finaluni á 1500 metrum rann seg til nýtt føroyskt met hjá kvinnum við tíðini 5.10,33. Hetta rakk til eitt flott 8. pláss.



*Rebekka Fuglø vann bronsu í kappingini á 600 metrum*

### Bjørk setti føroyskt met

Fyrr í ár setti 14 ára gamla Bjørk Herup Olsen nýtt føroyskt met fyri kvinnur á bæði 800 og 1500 metrum. Hesuferð skuldi Bjørk royna seg á 800 metrum. Og enn einaferð megnaði Bjørk at klípa nøkur sekund av metinum, sum nú er 2.26.58. Hetta gav henni eitt samlað 13. pláss. (Her skal tó skoytast uppí, at Tordis Debes hevur runnið teinin uppá 2.26,4, men at úrslit hennara ikki er galdandi sum met, av tí at hon rann saman við monnum) Sunnukvøldið rann Bjørk 2000 metrar, og